## EG MEINI TAÐ

# Móses í Svíngarðinum



*Niels Uni Dam skrivar:*

Í síðstu viku kom eg inn á eina skrivstovu, og har var eitt av útvarpstól tendrað, og sendingin "Í víngarðinum" var at hoyra. Hetta er ein sokallað andalig sending. Eg eri ikki so nógv fyri slíkum sendingum, men víngarðin kenna vit nokk øll.

Vertirnir tosa vanliga við onkran, sum hevur gjørt okkurt heilt vilt kristiligt. Ofta eru tað fitt innsløg sum eru nokkso lívsjáttandi. Men so var ikki hesuferð. Sjálvútrópti profeturin og muslimhatarin Móses Hansen, var gesturin í víngarðinum. Móses hevur gingið sum eitt ódnarveður og spreitt fremmandahatur í gøtunum í Keypmannahavn seinastu vikurnar. Hann hevur roynt at skapa ruðuleika á Nørrebro, fyri at tað longu útbreidda fremmandahatrið skal rótfestast enn fastari í donsku tjóðina.

Hesin maðurin gongur við sínum guði sum sannleiksvitni og spreiðir hatur. Hetta er í mínari verð vemmiligt og ódámligt. Men hetta er ikki eitt ókent fyribrigdi. Vit hava her í Føroyum fleiri av hesum hatursprofetum. Fólk sum hata sínar egnu freistingar so nógv, at tey gerast fanans besett. Tey uppføra seg sum svín. Eg havi fleiri ferð upplivað tann reindyrkaða óndskap, sum hesi fólk spreiða, og eg ræðist tey satt at siga.

Men aftur til Móses. Móses er svakur, soleiðis sum bert slík fólk eru svøk. Men talifrælsið tryggjar, at eisini tey svøku sleppa til orðanna. Hetta eri eg glaður fyri. Tí er tað fyri sovítt í ordan, at eitt tíðindablað sum Sosialurin hevur viðtalu við Móses. Tó haldi eg, at tey hevði verið meiri etiskt rætt, um blaðið lýsti veruligu støðuna í Danmark, og ikki bara lat menn sum Móses og Glistrup lýsa hana. Men hetta er pressuetikkur, sum Sosialurin átti at verið nóg at sær komin at skilja.

Pressuetikkur er tó ikki galdandi fyri "Í víngarðinum". "Í víngarðinum" er ein sokallað andalig sending. Hevur kristna gudin sum sannleikavitni. Tann sum ger sendingina hevur eina stóra ábyrgd, og hesa ábyrgd sveik hann, tá hann lat Móses sleppa framat mikrofonini.

Tey sum ikki vita betur halda, at boðskapurin hjá Móses er sannur, ja, beinleiðis frá sínum gudi. Tí at hetta er jú ein andalig sending.

Boðskapurin, um at muslimar fara at yvirtaka heimin, er léttur at selja í hesum Osama døgum. Líka léttur sum boðskapurin, um at jødar yvirtóku heimin var í 1930'unum.

Við Móses Hansen følnaði víngarðurin. Tann innari svínahundurin goyði hart, og sendingin var mest av øllum ein svíngarður.

Tað er ikki løgið, at muslimar ikki vilja nerta svín, tá tey spreiða so nógv hatur, sum hatta svínið ger.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro



*Grindadráp á Eystaruvág í Havn – helst undir krígnum ella har á leið. Havnarlagið og umhvørvið á Krákusteini og yvir í Trøð er nógv broytt hesi árini, og hvalvágin er flutt út í Sandágerð*

# Grindadráp á Havnarvág undir krígnum

**GAMLAR HAVNARMYNDIR**
*Eirikur Lindenskov*

Myndin omanfyri er av grindadrápi á Havnar – á Eystaruvág. Okkum er ikki heilt greitt – men helst undir krígnum.

Sum vit síggja, so er nógv broytt kring eystaru vág í Havn hesi árini. Stóra havnarútbyggingin broytir umhvørvið nógv, ikki minst økið á Krákusteini og yviri í Trøð, har nógv er sprongt burt, og har nógv hús máttu dvína.

Pakkhúsið hjá Pola í Dali uttast høgrumegin varð tikið burtur miðskeiðis í fimmtiárunum. Har hevði Venzel Petersen smiðju eitt skifti. Uppi á Krákusteini – ovast til høgru – síggja vit húsini hjá Niels á Krákusteini. Nakað heimanfyri síggja vit húsini hjá Hákun Djurhuus, fyrrverandi løgmanni, sum Kristian Djurhuus, eisini fyrrverandi løgmaður, bygdi. Hann seldi tey seinni til Poul Niclasen, sum var tingmaður og blaðstjóri á Dimmalætting.

Leif Mohr búði eitt skifti í hesum húsum, og seinni, helst beint eftir kríggið, búði Johan Djurhuus har eitt skifti, sonur Kristian Djurhuus, sum í mong ár var skrivstovustjóri í landsstýrinum

Heiman fyri hesini húsini síggjast »Kontrollørhúsini«, har postkontrollørurin, vanliga nevndur »Spiral Hansen« búði.

Síðani síggjast húsini hjá Leif Mohr, sum Martin Djurhuus, postkontrollørur, bygdi. Har veiftrar Dannebrog, so uttan iva er myndin tikin áðrenn Leif Mohr keypti húsini.

Tey lágu, hvítu húsini, sum síggjast heiman fyri hjá Leif Mohr, eru húsini hjá Hans Jacob Jacobsen, betur kendur sum Hans Jákup í Smæruni.

Niðri á Kongabrúnni síggjast eitt nú Stephanssons Hús. Tey bygdi Jóhannes Stephansson í 1924. Uttast vinstrumegin sæst pakkhúsið hjá DFDS. Síðan húsini, har Heimavirkið helt til í mong ár. Hetta var helst fyrsta skrivstovan hjá Skipafelagnum, tí navnið hjá Skipafelagnum sást koma undan har, einaferð málingin varð slitin burtur, minnast fólk. Húsini framman fyri Stephansonsshús hevði skeltið »Rør og Sanitet«. Har høvdu Børge Rubek-Nielsen og Tórstein Poulsen hjá Ludvig Poulsen smiðju.



Skjøldurin, sum sæst aftan fyri hetta húsið, er tann á húsunum hjá Marius Jensen, vrakara. Hesi húsini vóru sermerkt, m. a. tí, at inngongd var gjøgnum kvist, sum vendi móti Skansavegnum. Har var ein brúgv frá Skansavegnum yvir til kvistin, og har gingu fólk so inn í húsini.

Innan fyri Stephanssons hús sæst Ólastova, svarta flagtakta húsið, sum stendur har enn – sum eitt prýði. Ólastova var barnaheimið hjá Kristiani Djurhuus, sum var sonur Hans Andreas Djurhuus, Dia í Ólastovu.

Innan fyri tey sæst Rósuborg, høga hvíta húsið, sum í dag er partur av bygninginum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Hesi húsini bygdi Husted-Andersen, sakførarin, og vórðu tey nevnd eftur konu hansara, Rósu. Gjaldstovan hevði til húsa í Rósuborg í mong ár.

Húsini framman fyri Ólavstovu eru gomlu Kákhúsini.



# Føroyingar skulu tora at føra seg fram

– Føroyskir tónleikarar eru ofta ov smædnir, tá teir fara út um landoddarnar. Okkara royndir vísa, at møguleikarnir eru góðir, um tú torir at bjóða teg fram uttanlands, sigur Eyðfinn Jensen, sum saman við øðrum eigur MediaMusic upptøkuhølini í Keypmannahavn

**TÓNLEIKUR**
*Eyðun Klakstein*

**Keypmannahavn:** Í tvey ár hava føroyingar átt og rikið ein tónleikamiðdepil í danska høvuðsstaðnum, og tað hevur gingið væl.

MediaMusic hevur verið nýtt til nógvar og fjølbroyttar upptøkur av bæði føroyingum og dønum, og seinastu árið hevur føroyska studio í Danmark havt meira enn ein fingur við í framleiðsluni av tónleiki til Brand Enni.

Eyðfinn Jensen er stjóri fyri MediaMusic, sum hann eigur saman við Leivi Thomsen, Sven Bergi Jensen og Haraldi Winther Knudsen, og hann heldur, at føroyingar saktans kunnu standa seg í tónleikavinnuni í eitt nú Danmark.

– Vit eiga eina rúgvu av evnaríkum tónleikarum, sum bara skulu fara í gongd. Tað ræður um at bjóða seg fram, at tora, tí evnini hjá nógvum føroyskum tónleikarum eru eyðsýnd, sigur hann.

– Ofta er trupulleikin hjá føroyingum, at teir eru so smædnir og at halda, at hini duga betur, men soleiðis er tað als ikki altíð. Vit upplivdu hetta sjálvir, tá vit byrjaðu at spæla í Danmark. Leivur Thomsen og eg høvdu ein bólk, og vit vóru serstakliga væl móttiknir, tá vit komu út millum fólk. Vit høvdu úr at gera, og tað gav okkum eisini dirvi til at taka stig til eitt studio, sigur Eyðfinn Jensen.



*– Nógv tekin eru til, at okkurt spennandi hendir í føroyskum tónleiki í løtuni, sigur Eyðfinn Jensen, sum kennir seg sannførdan um, at føroyskir tónleikarar fara at fáa gjøgnumbrot uttanlands innan langa tíð*

### Polterabend í studio

Tað var í august mánaði í 2000, at MediaMusic fór undir sítt virksemi. Í eitt hálvt ár frammanundan høvdu Eyðfinn og teir arbeitt við at innrætta hølini á bestan hátt.

– Vit vildu gera umstøðurnar so góðar sum gjørligt. Vit brúktu nógva orku til at fáa upptøkuhølini so góð sum gjørligt, og vit hugsaðu eisini um, at tónleikararnir skulu trívast, tá teir eru í studio, sigur Eyðfinn Jensen.

Fyrsta stóra uppgávan hjá MediaMusic var útgávan hjá LuciNation við millum annað Tróndi Bogason og Maluni Eyðunsdóttir. Og síðani hevur nógv verið at gjørt. Fløgan hjá punkbólkinum 200 var spæld inn í MediaMusic, og ymiskar danskir bólkar hava tikið sangir upp í føroysku upptøkuhølunum.

– Endamálið við MediaMusic var at bjóða føroyskum tónleikarum møguleikar at taka upp í Danmark og at hjálpa teimum inn í danska tónleikaheimin, sigur Eyðfinn.

MediaMusic hevur eisini bjóðað vanligum fólki innar at taka sangir upp. Hetta hevur verið sera væl umtókt, og tað er ein ørgrynna av fólki, sum til stuttleika hava sungið onkran kendan sang inn í MediaMusic. Ofta hava tað verið fyritøkur, vinfólk ella fólk, sum halda polterabend.

Sjónbandaframleiðsla er ein annar týðandi partur av virkseminum hjá MediaMusic, bæði tá tað snýr seg um tónleik á høgum stigi, og eisini sum demo fyri bólkar, sum eru á veg fram.

Hevur ein bólkur eitt sjónbandalag, skilur hann seg beinanvegin út millum tær hundratals fløgurnar, sum plátufeløgini í Danmark fáa sendandi hvønn einasta mánað, og tað kann betra munandi um møguleikan at fáa ein plátusáttmála.

Media Music roynir eisini at fáa føroyskar bólkar út at spæla í Danmark, og heimasíðan hjá teimum – www.dansemusik.dk – er sera væl vitjað og hevur uppgávur við sær. Hendan heimasíðan verður útbygd í løtuni, so danir framyvir kunnu fáa enn fleiri føroysk tónleikatilboð.

### Samstarv er lykilin

Seinastu tíðina hevur MediaMusic lagt nógva orka verið at gera tónleik og annað til Brand Enni. Eyðfinn Jensen og Leivur Thomsen hava skrivað fýra sangir til Brand, og hesir hava fyri stóran part verið framleiddir í MediaMusic. Í løtuni er tað ein duet, har Brandur fer at syngja saman við tí Íslendsku barnastjørnini Johonnu Guðrun, sum er ovast á skránni.

Harafturat hevur MediaMusic eisini framleitt sjónbandaløg og promotion-tilfar fyri Brand, og stóran part av hesum ári hevur upptøkutól hjá MediaMusic fylgt Brandi Enni á ferð í Føroyum og uttanlands. Hesar upptøkur skulu brúkast til ein film, sum kemur út um nakrar mánaðir.

MediaMusic hevur verið eitt slag av miðstøð hjá Brandi Enni í Danmark, og Eyðfinn heldur, at samstarvið, sum hevur verið millum føroyskar tónleikarar og framleiðarar í hesum projekti, hevur verið sera gott.

– Føroyskir tónleikarar og studio hava ofta hugsað alt ov nógv um at kappast heldur enn at samstarva. Í arbeiðnum við útgávunum hjá Brandur Enni hava vit samstarvað nógv við Pegasus og JakZac, og tað er vegurin fram. Føroyingar skulu hugsa um at samstarva meira, tí tað kemur nakað gott burtur úr tí, heldur Eyðfinn Jensen.

### Fer at loysa seg

Brandur Enni hevur verið nógv frammi í hesum árinum, og ætlanin hevur allatíðina verið, at hann skal koma fram uttanlands eisini. Hetta arbeiða fólkini aftanfyri evnaríka tvørámannin framhaldandi við, og Eyðfinn Jensen roknar við, at okkurt spennandi fer at spyrjast burtur úr hesum arbeiði.

– Men tað arbeiðið, sum vit gera í sambandi við tónleikin hjá Brandur Enni, verður ikki bert gjørt við hansara ella okkara skuld. Vit vóna, at hetta kann hava nakað gott við sær fyri føroyskan tónleik. Tey sambond, sum vit fáa, og tey fólk, sum vit koma at kenna, kunnu gerast til stóra hjálp fyri føroyskan tónleik.

– Nógv tekin eru eisini til, at okkurt spennandi hendir í føroyskum tónleiki í løtuni. Seinastu árini er nógv broytt, og føroyingar vinna alt meira fram uttanfyri landoddarnar. Vit hava millum annað nøvn sum Teitur Lassen, Clickhaze, Týr, Pætur við Keldu og nú eisini Brand Enni, sum hava havt meira og minni undanvind uttanlands, sigur Eyðfinn Jensen, sum kennir seg sannførdan um, at føroyskir tónleikarar fara at fáa gjøgnumbrot uttanlands innan langa tíð.



*Leivur Thomsen er ein annar av høvuðsmonnunum í MediaMusic*